


# Leiðari til Deildartænastuna

**Deildin**
Aðalendamálið hjá Deildartænastuni er at hava ábyrgd av ávísum serøkjum. Haraftrat er deildin sentral fyri effektiviseringstilgongdina í Eik.
Deildin er skipað í eina Kundatænastu og í bólkarnar Lánibólkur, Kortbólkur, SWIFT-bólkur og Back-Office bólkur.
Deildartænastan hevur týðandi leiklut í lániprosessini, tinglýsing og realkredittlánunum, herumframt eisini eftirkannan av tryggingum og eftirløn. Allar flytingar til útheimin (SWIFT) vera avgreiddar ígjøgnum deildina. Í hesum sambandi verða konturnar eisini avstemmaðar á Deildartænastuni. Deildin hevur eisini ábyrgd av Back-Office, sum umfatar avvikling av virðisbrævahandlum, skráseting av corporate actions og avstemman av depotum v.m.

**Starvið**
Stórar broytingar fara fram á Deildartænastuni í løtuni, og hjá leiðaranum verður ein av fremstu uppgávunum at samskipa og umskipa arbeiðið á deildini, m.a. í sambandi við umlegging til nýggjar KT-skipanir.
Sum leiðari á deildini hevur tú ábyrgd av dagligu leiðsluni og skalt skipa arbeiðið soleiðis, at Eik samtakið kann geva starvsfólkum og kundum ein trygga, kappingaføra og góða tænastu. Eisini skalt tú menna deildina til at kunna seta í verk effektiviseringstilgongdir í samtakinum, í tøttum samstarvi við hinar deildirnar.

**Fakligir førleikar**
Vit vænta, at tú hevur bankaskúla ella hægri útbúgving. Leiðsluroyndir eru ein fyrimunur.

**Persónligir eginleikar**
Vit leita eftir einum persóni við góðum leiðaraevnum, og sum er ábyrgdarfullur og jaligur í sínum arbeiði. Sum leiðari er tað eisini umráðandi at tú ert ein teamspælari, sum dugir væl at motivera og tryggja samanhald.
Harumframt er umráðandi, at tú dugir at skapa tær eitt gott yvirlit yvir uppgávurnar og samstundis hevur eyga fyri smálutum. Tú dugir at raðfesta, varðveita fokus og megnar væl at strukturera fleiri parallellar aktivitetir og uppgávur.

**Vit bjóða**
Ein fjølbroyttan arbeiðsdag í avbjóðandi starvi, har broytingar og nýskapan eru lyklaorð. Tú fært góðar møguleikar at vera við og gera tína ávirkan galdandi, og tú hevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Leiðarin á Deildartænastuni vísir til Stjórn. Starvsstaðurin er Yviri við Strond 4 í Havn. Á Deildartænastuni starvast tilsamans 35 fólk.

Um tú hevur spurningar til starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Marjun Eystberg, tlf. 348510, teldupostur marjun.eystberg@eik.fo ella Elin Sigvardsen, tlf. 348290, teldupostur elin.sigvardsen@eik.fo

Starvið verður sett skjótast gjørligt og lønt eftir avtalu.

**Send umsókn til:**
Eik Banki
Att.: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

Umsóknin skal vera Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. august 2008 kl. 12.

**Les meira um starvið á www.eik.fo**

# Projektleiðari til Menningardeildina

**Deildin**
Menningardeildin er ein strategisk deild, ið arbeiðir við projektum hjá Eik samtakinum í Føroyum og uttanlands. Harumframt hevur Menningardeildin, í tøttum samstarvi við hinar deildirnar í Eik, ábyrgdina av prosess- og produktmenning, herundir dokumentatión og automatisering. Eisini røkir og mennir deildin tøkniliga samskiftið, virkisgongdir og tænastur í samstarvi við hinar deildirnar.

**Starvið**
Vit lýsa eftir einum dugnaligum projektleiðara, sum kann leiða menningina, optimeringina og raksturin av prosessum og øðrum aktivitetum hjá Eik. Uppgávurnar hjá projektleiðaranum eru m.a.:

- Projektleiðsla, -stýring og -eftirmeting
- Menning av nýggjum virksemi í samtakinum
- Menning/innkoyring av projektamboðum og -modellum
- Menning av virkisskipanum við KT og øðrum prosessamboðum

**Fakligar førleikar**
Nýggi projektleiðarin eigur at hava hóskandi útbúgving og royndir innan projektleiðslu, KT strategi- og menning. Hægri útbúgving og/ella royndir frá peningastovni eru ein fyrimunur, men ikki eitt krav. Tú hevur góðar analytiskar førleikar, dugir at raðfesta og varðveita fokus og megnar væl at strukturera fleiri parallell projekt og uppgávur.

**Persónligir eginleikar**
Vit leita eftir einum virknum og nýhugsandi projektleiðara, ið arbeiðir sjálvstøðugt við ymsum projektum, har fíggjarvirksemi er snúningsásurin. Evnini at samstarva, arbeiða skjótt við nýggjum hugskotum og at eggja øðrum til eru týðandi, og leiðin frá góðum hugskotum til veruleika má vera stutt. Tú skalt vera sinnað/ur at leggja stóra orku í arbeiðið og at menna teg bæði fakliga og persónliga.

**Vit bjóða**
Tú verður partur av einari spennandi deild við 9 starvsfeløgum, sum arbeiða málrættað og professionelt, og har nýhugsan og nýskapan eru lyklaorð. Tú fert at starvast í einum umhvørvi, har tú hevur ríkar møguleikar at gera tína ávirkan galdandi, samstundis sum vit hava fokus á tínari persónligari og fakligari menning.
Starvsstaðurin er Yviri við Strond 2 í Havn.

Um tú hevur spurningar um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Fanny Petersen, menningarleiðara, tlf. 348530, teldupostur fanny.petersen@eik.fo ella Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðara, tlf. 348510, teldupostur marjun.eystberg@eik.fo

**Send umsókn til:**
Eik Banki
Att.: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

Umsóknin skal vera Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. august 2008 kl. 12.

**Les meira um starvið á www.eik.fo**